# Tito biskupur takkar føroyingum vegna fátæku børnini í Kolumbiu



*Tito Jesus Mora Esquerra var ógvuliga fegin um ferðina í Føroyum, sum Atlantsflog og Sjómansheimið í Havn stuðlaðu. Við sær úr Føroyum hevði hann 50.000 krónur, sum Skótahjálpin veitir til hjálpararbeiði millum børn í Kolumbiu*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Tey fátæku børnini í San Vicente í Kolumbiu senda tykkum føroyingum nógv smíl, klemm, bønir og sangir - alt samalt við tøkk fyri hjálpina úr Føroyum, sigur Tito Jesus Mora Esquerra, biskupur úr Kolumbiu, sum hevur sent føroyingum takkarskriv**

TØKK

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kolumbiski biskupurin, Tito Jesus Mora Esquerra, sum var í Føroyum herfyri og tók ímóti skótahjálpini 2004, hevur nú sent føroysku fjølmiðlunum eina heilsan at bera føroyingum.

Sosialurin hevði samrøðu við Tito, tá ið hann var í Føroyum, og her greiddi hann frá, at hann var hóttur eftir lívinum í Kolumbiu, meðan hann enn búði í Kolumbiu. Tí býr hann nú í Noregi sum flótti, haðani hann hjálpir børnum í heimlandinum.

Úr Føroyum hevði hann 50.000 krónur, sum Skótahjálpin læt til hjálpararbeiði millum børn í Kolumbiu.

Tito var ógvuliga fegin um ferðina í Føroyum, sum Atlantsflog og Sjómansheimið í Havn stuðlaðu.

Úr Noregi hevur Sosialurin fingið persónliga heilsan frá Tito, sum Hans Eiler Hammer, sóknarprestur í farloyvi hevur sent okkum, og nú hevur biskupurin so eisini sent eina heilsan til allar føroyingar.

Vit prenta heilsanina hjá biskupinum í fullum orðaljóði:

**Jólaheilsan til føroyingar**

*"Jól eru kærleiki! Til at vísa okkum, hvat kærleiki er, sendi Gud, faðir okkara, son sín, Jesus Kristus, til okkara hjálparleysu fold. Jesus kom sum eitt fátækt barn til okkara. Hann kom til eina vanliga familju. Sum menniskja sýndi hann okkum tað lýtaleysa lívið í verki og orði. Eg vil heita á teg at lesa fyrsta kapittul í Jóhannesevangelinum. Her sært tú rættiliga Guds kærleika til okkara.*

*Tey fátæku børnini í San Vicente senda tykkum føroyingum nógv smíl, klemm, bønir og sangir, alt samalt til at takka fyri hjálpina úr Føroyum. Í navni hesa barna vil eg, at kona og maður skulu elska hvørt annað, at børn og vaksin skulu elska hvørt annað, at grannar skulu elska hvør annan, og at øll lond skulu elska hvørt annað. Hetta er ikki lætt, men heldur ikki ómøguligt. Men hvussu?*

*Okkara fyrimynd er Jesus Kristus.*

*Tað er lætt at vita, hvat Jesus segði og gjørdi, men tørført at føra hetta út í lívið. Eitt tað vakrasta, sum er skrivað um kærleikan, finna vit í fyrra Korintbrævi, kap. 13. Eisini tað er vert at lesa.*

*Eg vil takka øllum sum stuðlaðu føroysku skótahjálpini og harvið arbeiði okkara í Kolumbiu.*

*FELIZ NAVIDAD Y PROXPERO ANO NUEVO!*

*- Gleðilig jól og eydnuberandi nýggjár.*

**Tito, biskupur."**

# Jólabryggið gongur sum heitt breyð

**- Vit hava framleitt millum 150.000 og 200.000 fløskur av jólabryggi, sum vit vænta verður útselt til jólar, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór**

JÓLABRYGGJ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór í Klaksvík, sigur, at jólabryggið, sum bryggjaríið hevur á marknaðinum nú undan jólum, hevur selt ógvuliga væl.

– Eg haldi, at sølan nú til jólar hevur verið eini 15-20% størri í ár enn í fjør.

Hann sigur, at Føroya Bjór hevur bryggjað upp í einar 150.000-200.000 fløskur av jólabryggi, sum hetta ølið verður rópt, og hann væntaði mikudagin, tá ið vit høvdu hann í telefonini, at bryggið varð útselt seinnapartin hósdagin.

Jólabryggið hjá Føroya Bjór hevur gull-styrki, sum er 5,8%.

– Jólabryggið er væl egnað aftur við jóladøgurðanum, sigur stjórin.



*- Sølan av jólabryggi hevur verið eini 15-20% størri í ár enn í fjør, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór*

**Besta smakkin**

Einar Waag vísir á, at Selskab for Vestjydsk ølkultur triðja árið á rað hevur valt jólabryggið hjá Føroya Bjór at vera besta jólabryggið av hesi styrkini – og aftur hesaferð burtur úr fleiri ymiskum sløgum av øli.

– Vit halda, at føroyingar eisini hava tikið jólabryggið hjá okkum til sín, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór í Klaksvík.

Jólatrøllið, sum er jólabryggið hjá Restorffs Bryggjaríi, var ikki við í kappingini hjá Selskab for Vestjydsk ølkultur um besta smakkin.